

## Tónleikur

# Okkurt nýtt, okkurt spennandi og okkurt neiligt

**Tvey av mest spennadi nøvnunum innan føroyskan tónleik spældu á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn fríggjakvøldið. Nógv fólk var til staðar, tá ið Gestir og ORKA vístu, hvat teir dugdu**

UMMÆLI
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Tað eru fá støð, ið egna seg so væl til framførslur sum loftið á Norðurbryggjuni. Ein er noyddur at sita á einum hørðum gólvi (um tú ikki ert í góðari tíð og fær eitt av teimum fáu sitiplássunum aftast) og betri annlegg eru til, men hugnaligu hølini við sínum skráveggjum og síni slitnu útsjónd syrgja fyri, at eingin bólkur ella einstaklingur kann geva umstøðunum skuldina, um framførslan ikki gongur eftir ætlan.

Men hetta høvdu hvørki Gestir elle ORKA fyri neyðini, tí báðir bólkar góvu okkum meiri enn nokk fyri pengarnarnar.

**Broytingar - gott ella ringt?**
Gestir løgdu fyri, og tey, sum hava fylgt eitt sindur við, vita, at tað hava verið nakrar útskiftingar í bólkinum. Knút Háberg Eystur-stein (ljómborð) er ikki við longur, og Jens Thomsen er nýggjur bassleikari í bólkinum. Og hetta hoyrdist aftur.

Uttan at taka munnin ov fullan, so hevur sveimandi og sermerkta spælið hjá Knúti altíð verið eitt eyðkenni hjá bólkinum. Tað hevur verið við til at geva Gestum teirra egna sound, og á ein ella annan hátt verið eitt mótspæl til gittararnar hjá Ólavi og Torfinni.

Tí tyktist tað til tíðir eitt sindur tómt undir framførsluni. Og tá var einki galið við handverkinum hjá teimum fýra limunum í bólkinum. Teir spældu væl og spældu sum ein eind. Men eg saknaði Knút.

Hinvegin so var tað feitt at hoyra Jens, sum avgjørt gevur Gestum nakað nýtt á bassinum. Hann svingar væl og gjørdi nógv nýtt og egið.

**Nýtt og við farti á**
Gestir høvdu nógv nýtt tilfar, sum mær dámdi væl. Elektriskar trummur og synthbassar vóru við til at krydda nýggju sangirnar, og hetta riggaði væl. Gleði meg til at hoyra næstu fløguna hjá teimum.

Serliga síðsta lagið »Bjargingin« riggaði væl. Gestir hava altíð dámt best seigar og seinar rútmur. Teir hava ongan skund, so at siga. Men síðsta lagið koyrdi dupult so skjótt, sum nakað annað, eg áður havi hoyrt frá teimum. Og mær dámdi væl nýggju ferðina. Meiri av tí.

**Gandafrymilin**
Tað tók eina løtu at seta øll ljóðførini hjá ORKA upp, so tíð var til at keypa sær okkurt drekkandi og práta við vinir og kenningar. Til »føroyaframførslurnar« í Keypmannahavn savnast altíð nógvir føroyingar, og fyri nógv av hesum er tað líka nógv felagskapurin sum tónleikurin, ið dregur. Og á Norðurbryggjuni hetta kvøldið var lagið gott og nógv prát. Av tí sama sluppu ORKA at spæla eitt gott petti av fyrsta lagnum við fylgispæli frá vælhýrdu fjøldini. Riggaði bara heilt væl, spyrt tú meg.

Havi onkuntíð hugsað um, hvat tað er, ið ger ORKA til nakað serligt. Tí teir eru ikki sum aðrir bólkar. Er tað bara, tí at ljóðførini eru heimagjørd? Ella er tað tí, teir veruliga gera tónleik, sum heldur? Eg trúgvi, at tað eru hesi bæði saman, ið skilja bólkin frá øðrum. At fáa so nógv skrambul - tunnur, slíparar, kustar, ruskíløt - at ljóða so feitt og vakurt, er mítt skot uppá gandafrymilin. Ljóð, sum tú vanliga ikki hoyrir í tónleiki, og sum hvør sær ljóða undarligt, verða sett saman og... simsalabim: genialur tónleikur.

ORKA spældi fleiri løg av teirra fløgu Livandi oyða. M.a. »Volmar«, »Fjøllini standa úti« og »Myrkursins muður«, sum so smátt eru við at seta seg fast í



*Nógv av fólki – kanska serliga føroyingar – var møtt upp at lurta eftir bólkunum báðum, ið sambært ummælaranum góvu eina góða konsert*
*Myndir: Sunva Eysturoy*

➚